Fylgiskjal 3

Armgarð Weihe

Fra: Lív Krogh Arge
Sendt: 8. november 2022 16:54
Til: Hanna D. Andreassen; Mentamálaráðið
Cc: Hjalmar Hansen
Emne: SV: Uppskot til lł. um bókasøvn til hoyringar við freist 8. nov. kl. 12.00

Góðan dagin

Vit halda tað vera gott, at bókasavnslógin verður dagførd, av tí at galdandi lóg á fleiri økjum ikki er nøktandi, m.a. tí at samfelagið er broytt nakað síðani lógin kom í gildi, talgilding hevur fingið ein væl størri leiklut, útbúgvingarstovnarnir eru mentir, o.s.fr.

Til ítøkiligu uppskotini til ásetingar, hevur Undirvísingarstýrið hesar viðmerkingar:

Til § 11, stk. 1
"*Skúlabókasøvn skulu bjóða fram bøkur og annað tilfar og menna førleikar hjá næmingum, ið stuðla undir lívlangari læring, og sum brynja næmingarnar í at handfara upplýsingar á øllum miðlum.*"
Lívlong læring eigur at verða strika í hesa áseting, av tí at tað er eitt óviðkomandi hugtak á fólkaskúla- og miðnámskúlastøði. Hugtakið er strika í dagførdu støðisnámsætlanini. Í staðin kundi staðið, at skúlabókasøvn eru partar av námsfrøðiliga virkseminum í skúlum og skulu bjóða øllum næmingum bøkur og annað dygdargott og viðkomandi tilfar, sum stuðlar teimum í teirra læri- og menningartilgongd, og sum brynja næmingarnar í at handfara upplýsingar á øllum miðlum.

§ 11, stk. 2
"*Skúlabókasavn skulu verða í øllum skúlum*"
Mett verður, at hetta er ein ov stirvin orðing. Hetta leggur upp til, at tað er eitt krav, uttan mun til næmingatalið. T.d. eru fólkaskúlar, ið bert hava einkultar næmingar og tað er ikki skynsamt, at áleggja hesum skúlum at hava eitt skúlabókasavn. Tí átti ásetingin heldur at verða orða á tann hátt, at næmingar skulu hava atgongd til eitt skúlabókasavn. Henda atgongd fæst so við heimild í § 11, stk. 3, har skúlabókasavnið kann skipast saman við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla.

§ 11, stk. 4
"*Landsstýrismaðurin góðkennir samstarv millum bókasøvn sambært stk. 3*"
Vit meta ikki, at tað er neyðugt at landsstýrismaðurin góðkennir slík samstørv. Hetta er at leggja eina óneyðuga umsitingarliga forðing inn fyri smidligum samstørvum og skapar óneyðuga almenna umsiting. At skipa eitt skúlabókasavn saman við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla, megna skúlarnir sjálvir at samstarva um. Henda áseting eigur tí at verða strikað.

§ 12, stk. 1
"*Skúlabókasøvnini í fólkaskúlanum eru skipað sambært fólkaskúlalógini*"

Sambært § 23, stk. 3 í fólkaskúlalógini er kunngerðarheimild til nærri reglur til virksemi á skúlabókasøvnunum. Vit mæla til, at kunngerðin frá 2004 verður dagførd.

§13, stk. 1
"*Skúlabókasøvn skulu vera í øllum miðnámsskúlum og yrkisskúlum og øðrum skúlum, sum bjóða út útbúgvingar.*"
Eins og viðmerkingin til § 11 stk. 2, verður mett, at hetta er ein ov stirvin orðing. Í ávísum miðnámsskúlum og yrkisskúlum er so fáir næmingar, at tað ikki er skynsamt at hvør skúli skal hava egið skúlabókasavn.
T.d. er í dag onki skúlabókasavn í Sjónám, bókasavnið hjá Miðnám á Kambsdali og HF-Klaksvík eru skipaði saman, eins og bókasavnið hjá Miðnám í Suðuroy og Heilsuskúla Føroya eru skipaði saman.
Tí átti ásetingin heldur at verða orða á tann hátt, at næmingar í miðnámsskúlum, yrkisskúlum og øðrum skúlum skulu hava atgongd til eitt skúlabókasavn, har teir síðani við heimild í § 11, stk. 3 kunnu gera eitt samstarv við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla.

§ 13, stk. 2

"Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1."
Tað hevur týdning, at kunngerðin verður lýst beinanvegin lógin er sett í gildi. Hetta tí at ávísir skúlar longu hava eitt samstarv um skúlabókasavn.

§14, stk. 1
"Skúlabókasøvn skulu vera í frískúlum, eftirskúlum og serskúlum, sum bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli."
Eins og víst á í viðmerkingunum til § 11 stk. 2 og § 13, stk. 1 meta vit, at orðingin er ov stirvin og at tað ikki er skynsamt, at hvør skúli skal hava eitt skúlabókasavn.
Ásetingin átti heldur at verða orða á tann hátt, at næmingar í frískúlum, eftirskúlum og serskúlum, sum bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli, skulu hava atgongd til eitt skúlabókasavn, har teir síðani við heimild í § 11, stk. 3 kunnu samstarva við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla.
Harafturat skal viðmerkjast, at háskúlar og húsarhaldsskúlar bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli. Tað er ógreitt, um háskúlar eru umfatað av §14. Vit ynskja tí, at tað verður nágreinað, um háskúlar eru fevndir av § 14 ella ikki.

§ 14, stk. 2.
"Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1."
Neyðugt er at kunngerðin verður lýst beinanvegin lógin verður sett í gildi. Hetta tí at ávísir skúlar longu hava eitt samstarv um skúlabókasavn.

Til seinast skal leggjast afturat, at tað í viðmerkingunum undir pkt. 2.1. um fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur ikki stendur nakað um, hvør fíggjarliga avleiðingin/kostnaðurin er fyri ymisku skúlarnar, m.a. fólkaskúlar og miðnámsskúlar. Tað stendur nógv um fólkabókasøvnini, men ikki er nevnt, um hædd er tikin fyri játtanirnar til skúlarnar.

Vinaliga

Lív Krogh Arge, løgfrøðingur
+298 555042 | liv@uvs.fo

Undirvísingarstýrið

+298 200 900 | undirvising@uvs.fo | www.undirvising.fo

Fra: Hanna D. Andreassen <hanna@ummr.fo>
Sendt: 11. oktober 2022 14:07
Til: Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; kf@kf.fo; Kappingareftirlitið <kapping@kapping.fo>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; info@vh.fo; Felagið Fjølrit <post@fjoelrit.fo>; nielsjakup@bms.fo; rit@rit.fo; Sjon <sjon@sjondepilin.fo>; lesa@lesa.fo; lararaf@lararafelag.fo; Føroya Pedagogfelag <pedagog@pedagogfelag.fo>; Nám <nam@nam.fo>; Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; sjonam@sjonam.fo; hsf@husarhaldsskulin.fo; Føroya Fólkaháskúli <haskulin@haskulin.fo>; Rásin <Rasin@rasin.fo>; info@his.fo; info@eftirskulin.fo; Brúgvin Eftirskúlin í Skálavík <info@brugvin.fo>; friskulin@keldan.fo; friskulin@friskulin.fo; litliskuli@skulin.fo; Skúlin á Trøðni <sat@sat.fo>; Granskingarráðið <Gransking@gransking.fo>; LBS - Avgreiðsla <lbs@landsbokasavnid.fo>; savn <savn@savn.fo>; info@art.fo; hav@hav.fo; us <us@us.fo>; Listafólkasamband Føroya <lisa@lisa.fo>; vigdisb <vigdisb@bbs.fo>; leikarafelag@leikarafelag.fo; fomyndlist@gmail.com; post@journalist.fo
Cc: Armgarð Weihe <ArmgardW@ummr.fo>
Emne: Uppskot til ll. um bókasøvn til hoyringar við freist 8. nov. kl. 12.00
Prioritet: Høj

Góðu tit

Viðhefta lógaruppskot við fylgiskjali (bókasavnsálitið) - verður sent út til hoyringar við hoyringarfreist **8. november 2022, kl. 12.00.**

Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra lógarverkið á bókasavnsøkinum. Síðani galdandi bókasavnslóg, løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005 varð sett í gildi, hevur samfelagið á fleiri økjum verið fyri stórum broytingum. Ikki minst á útbúgvingarøkinum, á samskiftisøkinum og á tøkniliga økinum seta hesar broytingar alt størri krøv til tænastuveitingarnar á bókasavnsøkinum.

Møgulig hoyringarsvar verða at senda ummr@ummr.fo.

Málið verður sent hesum hoyringarpørtum:

- Stjórnarráðunum
- Kommunufelagnum
- Kappingareftirlitinum
- Fróðskaparsetri Føroya
- Vinnuháskúlanum
- Fjølrit
- Felagnum Føroysk Bókaforløg
- Rithøvundafelagnum
- Sjóndeplinum
- Føroya Blindafelag / sjon@sjondepilin.fo
- Felagnum Lesi- og skriviveik
- Føroya Lærarafelag
- Føroya Pedagogfelag
- Námi
- Undirvísingarstýrinum
- Sjónámi
- Húsarhaldsskúla Føroya
- Føroya Fólkaháskúla
- Rásini
- Ítróttarháskúlanum í Suðuroy
- Føroya Eftirskúla
- Brúgvini, eftirskúlinum í Skálavík
- Frískúlanum Kelduni
- Frískúlanum í Havn
- Lítlaskúla
- Skúlanum á Trøðni
- Granskingarráðnum
- Landsbókasavninum
- Tjóðsavninum
- Tjóðskjalasavninum
- Listasavni Føroya
- Havstovuni
- Jarðfeingi
- Umhvørvisstovuni
- LISA
- Bókavarðafelagnum / Vígdis Bjarnadóttir vigdisb@bbs.fo
- Leikarafelag Føroya
- Felagnum Føroysk Myndlistafólk
- Felagnum Føroyskir Yrkisfotografar / lisa@lisa.fo
- Felagnum Føroysk Miðlafólk

LM-055/2022

Vinarliga / Best Regards

Hanna D. Andreasen

Uttanríkis- og mentamálaráðið

☎: +298 55 50 60

mailto:hanna@ummr.fo www.ummr.fo